# Várlig Hans A. Djurhuus kvøldseta í Vestmanna



*Hetta verður seinastu ferð, at Kári Bæk fer at standa fyri sangkórinum*

Í annaðkvøld, leygarkvøldið klokkan 19.30 skipar Vestmanna Sangkór fyri hugvekjandi kvøldsetu í auluni í Vestmanna Skúla. Kvøldsetan ber heitið eftir einum av okkara kendastu yrkjarum, kanska tí mest fólkakæra av teimum øllum, nevnliga Hans Andrias Djurhuus.

Tað verða vár- og summarsangir, fosturlandssangir og sjómanssangir, sum Vestmanna Sangkór fer at bera fram.

Rithøvundurin Hanus Kamban fer at fortelja um Hans Andrias, um yrkjaran og um sangirnar.

Eisini fara Vestmannabørn at syngja nakrar sangir hjá Hans Andriasi.

Kórleiðari verður Kári Bæk. Tað hevur hann eisini verið í nógv ár, men hetta kvøldið verður nakað serligt, tí nú fara Kári og Marjun til Gøteborg í Svøríki at búgva og virka, so verður tað seinastu ferð á hesum sinni, at Kári Bæk fer at standa fyri kórinum.

Øll eru hjartaliga vælkomin til kvøldsetuna, siga fyrireikararnir.

# Stanley og Astrid bergtóku ung sum eldri

**Konsert**

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Myndir: Jan Müller*



*Stanley og Astrid framføra í Miðlahúsinum*

Ein av okkara fólkakærastu tónleikarum, Stanley Samuelsen hevur aftur tikið heimligu frændir sínar í Føroyum á bóli. Hóskvøldið bergtók hann saman við dóttrini Astrid tey umleið hálvthundrað fólkini, sum leitað høvdu sær oman í Vágsbotn at hoyra tey spæla og syngja. Tað var sonn kvøldarkvirra í Miðlahúsinum, tá hesin trupadururin av einum sangara og guitarvirtuosi hugtók ung sum eldri.

Stanley, sum við jøvnum millumbili, leitar heim aftur á klettarnar við sínum guittara, hevði hesaferð dóttrina Astrid við, sum fyri fyrstu ferð royndi seg til eina almenna konsert. Hon framførdi sangir eftir George Harrison og so Silvio Rodriguez, sum eisini ber heitið tann kubanski Bob Dylan. Stanley framførdi nøkur av sínum kendum løgum, men eisini onkur nýggj, sum vera við á triðju fløgu hansara, vóru á skránni.

Tey bæði halda fram við konsertferðini í kvøld og annaðkvøld. Ì kvøld gongur leiðin til heimbygdina Fuglafjørð, har tey fara at framføra á bókasavninum klokkan 20, og leygarkvøldið verða tað vágsfólk og ikki minst miðvingar, sum sleppa at hoyra tann kensluborna og hugtakandi sangin og guitarspælið. Tann konsertin verður í bygdahúsinum í Miðvági klokkan 20.



*Millum mongu Stanley"beundrararnar" var eisini Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum her er saman við Stanley og Astrid*









**KIA Sorento**

Kia Sorento hevur nú fingið eina andlitslyfting og er eini av best umtóktu 4x4 á evropiska marknaðinum. Við 170HK og eini togmegi uppá hálvtfjórða tons er hetta ein ektaður 4x4 við einum botntrekki uppá 392 Nm. Kortini er hetta at meta við ein sera vælútgjørdan SUV, nærmast sum ein luksuskendan stationcar. Sorento fæst eisini sum vørubilur.

**úr kr. 375.800**



**Kia Picanto** úr kr. 124.800



**Kia Magentis** úr kr. 224.800



**Kia Carnival** úr kr. 334.800



**Kia Rio** úr kr. 159.800



**Kia Carens** úr kr. 256.800



**Kia cee'd** úr kr. 184.800

## Kia – millum heimsins fremstu bilaframleiðarar

Kia Motors hevur bygt sína egnu bilverksmiðju í Evropa og floymir nú yvir evropeiska marknaðin við rúkandi ferð. Talan er um eina bilverksmiðju, sum hevur stórar ætlanir í Evropa. Verksmiðjan er ein tann mest framkomna í øllum heiminum, og í 2007 tóku teir allan bilaídnaðin á bóli við at geva heilt upp til 7-ára garanti upp á sínar bilar. Málsetningurin hjá Kia Motors er heilt greiður. Teir skulu verða millum heimsins størstu bilframleiðararnar.

BM Berg Motors Sp/F · Staravegur 1-3 · FO-110 Tórshavn · tel 31 35 35 · www.bergmotors.fo